# Jens Martin í NSÍ til 2005

**Mikukvøldið skrivaði Jens Martin Knudsen undir ein nýggjan trý ára sáttmála við NSÍ, har hann verður málmaður og ungdómsleiðari til 2005. Og brasilski Messias Perreira hevur eisini gjørt sáttmála við NSÍ.**

FÓTBÓLTUR
*tíðindaskriv*

Ofta hevur verið sagt um NSÍ, at felagið hevur eitt gott ungdómsarbeiði og góð ungdómslið. Stendur tað til nevnd og leiðslu felagsins, verða komandi árini heldur eingi undantøk á hesum øki.

Mikukvøldið varð sáttmáli gjørdur millum NSÍ og Jens Martin Knudsen, sum fevnir um trý tey næstu árini, til og við 2005. Jens Martin hevur skrivað undir at vera bæði málmaður og ungdómsleiðari.

— Hetta er í grundini sami sáttmálin, sum vit longu hava havt við Jens Martin, sum nú verður longdur við trimum árum, og tað merkir fyri okkum, at ungdómsarbeiðið er í einari fastari legu eitt fitt petti fram í tíðina, sigur Jákup Mortensen, formaður í NSÍ.



*Jákup Mortensen, formaður í NSÍ, og ungdómsleiðarin í felagnum fram til 2005, Jens Martin Knudsen, skriva undir nýggjan trý ára sáttmála*

— Vit hava verið væl nøgdir við tað arbeiði, Jens Martin hevur gjørt higartil, og vit gleða okkum til at halda fram við samstarvinum.

### Upp í árini

Jens Martin Knudsen, sum fyllir 36 í summar, verður 38 ára gamal, tá sáttmálin hjá honum við NSÍ gongur út í 2005, so alt bendir á, at hann endar sína virknu fótbóltstíð í barndómsfelagnum.

— Enn eri eg ikki móður av at spæla fótbólt, og tá málmenn sigast at eldast væl, síggi eg bara fram til hetta sáttmálaskeiðið, eg nú havi skrivað undir uppá, sigur hann.

— Og at eg nú geri ein trý ára sáttmála, merkir avgjørt ikki fyri mítt viðkomandi, at eg ikki havi stórar ambitiónir. Eg gleði meg tvørturímóti til at vera við í byrjanini av einum nýggjum og vónandi fruktagóðum tíðarskeiði hjá felagnum.

Jens Martin Knudsen sigur, at tað eisini hevur nógv at siga fyri seg, at hann kann halda fram í starvinum sum ungdómsleiðari hjá NSÍ, tí so kann hann fylgja gongdini allan vegin.

— Vit hava lagt eina fimm ára ætlan fyri menningina av okkara ungdómsarbeiði, og tá eg nú havi verið við tey fyrstu tvey árini, vil eg fegin hava fingurin á pulsinum trý tey næstu eisini, sigur hann.

### Messias komin

Umframt at hava gjørt trý ára sáttmála við roynda málmannin, hevur NSÍ eisini fingið ein nýggjan spælara í hópin í hesi vikuni.

Tað er 30 ára gamli Messias Perreira, sum framman undan hevur spælt við B68 síðani 1999, ið nú verður at síggja í teimum gulu og svørtu búnunum hjá NSÍ.

Hann kom í vikuni til landið úr Brasil, og hóskvøldið skrivaði hann undir ein sáttmála við NSÍ, sum merkir at Messias spælir í Runavík hetta kappingarárið.

— Sum er, haldi eg okkum hava ein spennandi hóp, sum í størsta mun byggir á okkara egna fólk. Eg síggi spentur fram til komandi kappingarárið, ið eisini hevur europeiskar avbjóðingar við sær, sigur NSÍ-formaðurin Jákup Mortensen.

— Spælararnir hjá okkum hava eitt ár meira av royndum við sær til hetta kappingarárið, og hóast onkur er farin burturav, haldi eg tað síggja gott út hjá okkum. Fyribils bendir einki á, at vit hava fyri neyðini at víðka meira um hópin.

Ein spælari, sum eisini er aftur at síggja í NSÍ, har hann ikki hevur spælt seinnu árini, er Eyðstein Skipanes. Fyrst var hann eitt ár í B68 og síðani hevur hann verið tvey ár niðri, men er nú leitaður aftur til røturnar og skal fyrst og fremst herða kappingina um plássini á miðvøllinum.

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

Coca-Cola kappingin, finala

| | | |
|---|---|---|
| 08.02 | 15.00 | VÍF-VB, kvinnur |
| 08.02 | 17.00 | StÍF-Kyndil, menn |

### Flogbóltur

Meistaradeild kvinnur

| | | |
|---|---|---|
| 07.02 | 20.00 | ÍF-Fleyr |
| 09.02 | 13.00 | KÍF-TB |
| 09.02 | 13.00 | Mjølnir-Dráttur |

Meistaradeild menn

| | | |
|---|---|---|
| 07.09 | 20.00 | ÍF-Fleyr |
| 09.02 | 15.00 | Mjølnir-SÍ |

## Flogbóltsstøður

### Meistaradeild, kvinnur

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Mjølnir | 15 | 12 | - | 3 | 40 | 14 | 26 | 17 |
| 2 ÍF | 15 | 12 | - | 3 | 40 | 18 | 22 | 16 |
| 3 TB | 15 | 11 | - | 4 | 38 | 15 | 23 | 14 |
| 4 Dráttur | 15 | 6 | - | 9 | 23 | 35 | -12 | 7 |
| 5 Fleyr | 15 | 3 | - | 12 | 13 | 38 | -25 | 5 |
| 6 KÍF | 15 | 1 | - | 14 | 8 | 42 | -34 | 1 |

### Meistaradeild, menn

| | d | v | - | t | v sett | t sett | +/- sett | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 ÍF | 12 | 10 | - | 2 | 32 | 8 | 24 | 12 |
| 2 Mjølnir | 12 | 8 | - | 4 | 26 | 17 | 9 | 11 |
| 3 SÍ | 12 | 6 | - | 6 | 20 | 20 | 0 | 9 |
| 4 Fram | 12 | 6 | - | 6 | 22 | 20 | 2 | 8 |
| 5 Fleyr | 12 | 0 | - | 12 | 1 | 36 | -35 | 0 |

Vikuskifti

Nr. 27 • leygardagur • 8. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

Lívsgleði fram um sjúku

11 ára gamla Svanna Jacobsen úr Klaksvík hevur cystiska fibrosu

Lesið síðu 6 & 7





*Børnini í útibarnagarðinum, Spírin, í Havnardali, spældu úti í nógva kavanum, sum kom niður fyrst í vikuni. Teimum dámdi væl at vera úti og tey hugnaðu sær rættiliga í øllum kuldanum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

# Tey njóta kavan

Í kavaveðrinum, sum hevur ligið í vikuni, spældu børnini í útibarnagarðinum, Spíranum, í Havnardali úti í góða veðrinum. Teimum dámar væl at vera úti og lupu tey skalv og skreiðaðu allan dagin

KAVAVEÐUR
*Ingrid Bjarnastein*

Endiliga, vilja summi kanska siga, kom kavin. Fyrst í hesi vikuni kavaði illa, og kavin legðist hvítur um alt landið. Til stóra frøi hjá summum og kanska heldur minni hjá øðrum.

Men nøkur av teimum, sum veruliga njóta gott av kavanum, eru børnini í Spíranum, útibarnagarðinum í Havnardali. Eitt sindur niðanfrá húsunum, uppi á einum heyggi, síggjast nakrir smáir prikkar. Viðhvørt flyta teir seg skjótt omaneftir, men so steðga teir aftur.

Tá gingið verður nærri ímóti hesum smáu prikkunum, sæst beinanvegin, at hetta eru børnini, sum ganga í útibarnagarðinum. Tey eru saman við arbeiðs-fólkunum farin út at spæla í nógva kavanum. Ein stór skreiðibreyt er gjørd oman eftir heygnum, og longur uppi sæst, at børnin hava lopið skalv.

– Tað er ordiliga stuttligt at spæla í kavanum. Vit hava gjørt eina dukku, sum vit spæla er Jesus-barnið. Vit hava gjørt eygu og munn og nú fara vit at gera hár, sigur Diana, sum er ein av gentunum, sum sita niðast við skreiðibreytina og spæla.

Dreingirnir eru longur uppi, men teir nærkast eitt sindur. Børnini líkjast smáum kavamonnum, men tey eru als ikki køld, tí tey eru væl bjálvað. Kjálkarnir eru reyðir, og eyguni glógva.

– Vit hava verið úti síðani klokkan hálvgum ellivu í morgun, greiðir ein av teimum vaksnu frá. – Matpakka við, og so eta vit úti. Tað gera vit altíð um veðrið er til tað.

Børnunum dámar væl at vera úti.

– Tey hava vant seg við tað, at tað er úti, tey skulu vera. Aðrir barnagarðar grenja um, at tey fáa ikki børnini út, men her er tað ongin trupulleiki.

Nú gongur leiðin heilt niðaná. Nú skulu øll børnini vísa okkum, hvussu skreiðibreytin riggar og hvussu tey leypa skalv. Genturnar verða tó sitandi, tær tíma kanska ikki eins væl alt hetta baksið. Men dreingirnir fara omaneftir við fullari ferð. Og tá teir eru komnir oman, fara teir við góðum treysti niðan aftur og royna einaferð afturat.

– Børnini eru eitt sindur móð nú. Vit hava verið úti so leingi, so nú fara vit skjótt at venda nøsini heimaftur.

Men hugurin er góður og veðrið eisini gott. Onkur kavaæl eru viðhvørt, men børnini njóta kavan. Tey hugna sær veruliga, tí hetta er jú fyrsta rættiliga kavaveðrið, vit hava havt í vetur.